## DAGSINS MEINING

# Ørkymlandi støða

Týsdagin varð greitt, at føroyingar fáa eina fýra ára búskaparliga skiftistíð, um teir atkvøða fyri ætlanini hjá landsstýrinum á fólkaatkvøðuni tann 26. mai. Danski forsætisráðharrin skar út í papp, at sigur Føroya folk ja tann 26. mai, so er fullveldistilgongdin byrjað. Líka mikið, hvat føroyingar atkvøða í 2012.

Tað var væntandi, at danska stjórnin fór at halda seg til 4 ára skiftistíð, men tað var kanska óvæntað, at forsætisráðharrin fór at leggja ætlanina hjá landsstýrinum soleiðis út, at fullveldistilgongdin er byrjað. Løgmaður hevur roynt at vísa á, at um 12 ár skulu føroyingar taka støðu, um teir vilja skipa Føroyar sum fullveldisríki ella ikki.

Orðini hjá forsætisráðharranum fingu ti formenninar í øllum landsstýrisflokknum at staðfesta, at forsætisráðharrin roynir at ræða føroyska veljaran til ikki at atkvøða ja tann 26. mars.

At tann seinra fólkaatkvøðan fór at skapa trupulleikar kundi væntast. Vit kunnu sjálvandi kjakast um, og hava ymiskar meiningar um, hvussu moralskt bindandi ein ein lógarsamtykt, sum er staðfest á eini fólkaatkvøðu, er, men tað er næstan indiskutabult, at seinra fólkaatkvøðan ørkymlar og skapar politiskan ruðulleika longu nú.

Munurin millum samgonguna og Javnaðarflokkin skuldi ikki verið stórur nú, tá hugsað verður ætlania fyri yvirtøkur og ætlanina at skapa ein sjálvberandi búskap, men líkt er hinvegin til, at fólkaatkvøðan í 2012 um fullveldið ger munin. Henda fólkaatkvøðan var eisini tikin fram á almennum fundi í Sjálvstýrisflokkinum ígjárkvøldið, og fleiri hildu, at henda skuldi ikki verið ásett nú.

Tað skuldi verið upp til politiska myndugleikan og Føroya fólk tá, at tikið støðu til framtíðina. Heldur skuldi hetta landsstýrið framt nakrar yvirtøkur, tí hetta landsstýrð hevur gjørt líka lítið sum sjálvstýrislandsstýrið við atliti til yvirtøkur, hildu sjálvstýrisfólk!

Sum skilst, kom henda seinra fólkaatkvøðan inn í myndina eftir kravi frá Tjóðveldisflokkinum, og tað gjørdist partur í semjui hjá landsstýrinum. Men eitt krav, sum óivað aftur forðar fyri eini breiðari semju í sjálvstýristilgongdini. Seinasta orðið er tó ikki skrivað enn, sum formaðurin í Sjálvstýrisflokkinum segði týskvøldið.

**Sosialurin**

## NØVN Í VIKUNI

# Minningarorð um Steingrím Martin Guttesen

*f. 18. apríl 1913 d. 17. januar 2001Góði abbi!*



Ja, nú ert tú endiliga sloppin heim. Tað hava vit biðið um, tí tú tímdi ikki meira nú til seinast. Álíkavæl so gráti eg, tí minnini eru nógv og saknurin stórur.

Tað, sum eg minnist teg best fyri er, at tú altíð vitnaði um Jesus. Um tað var úti á gøtuni ella á møti. Ofta varð eg flov av at tú altíð vitnaði um Jesus, men tú visti hvat tað galt. Tú ynskti at vinna menniskju fyri Jesus.

Eitt annað var, at tú ongantíð var seinur at geva. Tað upplivdi eg fyrst tá eg var smágenta, tá tú gav mær eina 5 krónu nú og aðra tá. Bara tú fekk eitt klemm afturfyri, so vart tú glaður. Seinni, tá eg og Gunnar búðu inni hjá tær, tá tú ikki sjálvur kláraði at gera tað, so fekk eg ordrar um at senda pengar til handan og hasi. Tá lærdi eg, at man verður ikki fátækur av at geva nógv.

Nakað, ið tær dámdi væl, var at vitja fólk. Høvdu øll verið so røsk at vitja hvønnannan sum tú var, so vóru tað fá, sum sótu einsamøll í dag.

Ungdómligur, tað vart tú. Sjálvt um tú var farin upp um tey 80, so kundi tú væl finna uppá at koma á ungdómsmøti. Tær dámdi so væl børnini og tey ungu, tey gjørdu teg glaðan.

Temperament, tað hevði tú. Tað upplivdi eg eisini sum smágenta, tá eg og nakrar aðrar gentur runnu niðri á brúnni um kvøldið og nógv brim var. Tá rópti og skeldaði tú okkum so hart, at vit runnu niðan og goymdu okkum fyri tær, so bangnar vóru vit. Tá hugsaðu vit ikki, at tú vart bangin fyri at brimið kundi taka okkum út við, tað veit eg nú.

Og so var tað grindin, sum kundi fáa títt temperament í kók. Tá tú ikki sjálvur kundi fara oman á sand at hjálpa til, hekk tú út í-gjøgnum vindeygað og rópti, hvussu teir ungu skuldu gera. Tá drápið var liðugt, vart tú útlúgvaður, sum um tú sjálvur hevði verið við at skorið á háls. Men tá byrjaði tú at kvøða í stovuni, har tú altíð sat, »raske drenge grind at dræbe, det er vor lyst«.

Eg kundi blivið við at skriva um teg, abbi, men tað hevði verðið ov nógv. Tað viktigasta er, at tú nú hevur tað gott og kanst hvíla teg heima hjá Gudi. Vónandi haldi eg eisini út, so eg eisini kann koma heim til Gud og tá skulu vit síggjast.

Eg vil ongantíð gloyma teg. Takk fyri alt.

Hetta kórið dámdi tær væl og nú ert tú har:

*Tað verður fest í Himli*
*Fest í Himli.*
*Tú ert boðin við*
*og eg eri boðin við.*
*Tað verður fest í Himli*
*Fest í Himli*
*Øll eru boðin við.*

**Helga Nordendal**

Felagið Pinkubarnadeyði:

# Jógvan Fríðriksson tosar um lívsvirði

Pinkubarnadeyði:

**Annanhvønn leygardag klokkan 14 hittast fólk í Felagnum Pinkubarnadeyði í Jakupsstovuhúsunum í J. Patursonargøtu 24 í Havn.**



Endamálið hjá felagnum er at hittast og tosa saman um felags sorg og miss, ið fólk hava verið fyri – bæði nýliga ella fyri árum síani. Familja, vinir o. o. eru altíð vælkomin við.

Leygardagin komandi kemur Jógvan Fríðriksson, sóknarprestur á Strondum at tosa um eitt sera áhugavert evni, »lívsvirði«, eftir at tú hevur mist eitt barn.

Øll, ið hava áhuga fyri evninum, eru hjartaliga vælkomin, sigur felagið.

## Tøkk

Hjartaliga tøkk til tykkum øll, sum á ymsan hátt sýndu samkenslu og hjálpsemi, tá okkara elskaða mamma, vermamma, omma, langomma og olduromma

**Anna Sofía Jacobsen**

andaðist og varð jarðað.

Vit takka Gudi fyri allar signingar, hann gav okkum gjøgnum mammu, sum hann nú hevur tikið heim í dýrd til sín – eftir eitt langt og gott foldarlív.

Familjunnar vegna

**Thurid**

Sosialurin

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:**
Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:**
Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Tíðindaleiðari:**
Jústinus Eidesgaard justinus@sosialurin.fo
**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Marjun Dalsgaard marjun@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
John Johannessen john@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Turið Kjølbro turid@sosialurin.fo

Stefan í Skorini stefan@sosialurin.fo
**Mentan:**
Birgir Kruse birgir@sosialurin.fo
**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1
700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Útgevari/uppseting:**
Sp/f Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin

**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað
mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254mm breið og 346mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

Ein heil síða í Sosialinum er 254mm breið og 348mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.



Fjarskiftiseftirlitið lagt uppí:

# Lindin órógvar lurtitólini

**Síðani Lindin fór at senda í Klaksvík, hevur Fjarskiftiseftirlitið fingið ørgrynnu av klagum úr Klaksvík. Orsøkin er, at sendarin hjá Lindini ger lurtitólini í ørviti. Verða viðurskiftini ikki fingin í rættlag, kann Fjarskiftiseftirlitið steðga sendingunum hjá Lindini**

ÚTVARP
*Eyðun Klakstein*

Seinastu dagarnar hevur kristiliga útvarpsrásin Lindin sent umvegis nýggjan sendara á Brúnaskarði í Klaksvík.

Hetta hevur skapt stóra misnøgd millum fólk í Klaksvík, og orsøkin er ikki, at innihaldið í sendingunum kemur upp á tvørs hjá nøkrum.

Orsøkin er hinvegin, at Lindin órógvar hinar rásirnar og hevur lagt seg á meginpartin av FM-bandinum í nógvum lurtitólum.

– Vit hava fingið nógvar uppringingar og teldubrøv úr Klaksvík, síðani Lindin fór at senda leygardagin. Fólk klaga um, at Lindin órógvar lurtitólini, sigur Don Petersen á Fjarskiftiseftirlitinum.

### Sendarin skal kannast

Allir tríggjar útvarpsrásirnar senda nú í Klaksvík. Útvarpið er á 94,3 MHz, Rás 2 á 107 MHz, og ímillum hesar rásirnar er Lindin nú farin at senda á 105 MHz.

Men byrjanin hjá Lindini hevur verið órógvandi fyri lurtitólini, sum eru vorðin í ørviti av nýggja sendaranum. Nógv fólk í Klaksvík uppliva í hesum døgum, at skrúva tey á FM, so er Lindin allastaðni, og tað skulu neyvir fingrar til at finna rætta staðið á FM, so bara ÚF ella Rás 2 hoyrist.

Summi fáa hinvegin sendingarnar hjá Lindini sum bakgrund, tá tey lurta eftir ÚF ella Rás 2.

– Vit upplivdu somu trupulleikarnar, tá Rás 2 fór at senda, og tí kemur tað ikki heilt óvart á okkum, at hetta hendir hjá Lindini eisini, sigur Don Petersen á Fjarðskiftiseftirlitinum.

– Vit hava vent okkum til Lindina, sum síðani hevur biðið Føroya Tele kanna sendaran á Brúnaskarði. Vit rokna við, at trupulleikarnir í Klaksvík verða loystir innan stutta tíð, sigur Don Petersen.

### Kunnu steðga sendingum

Fjarskiftiseftirlitið skal syrgja fyri, at útvarpsrásirnar senda sum tær skulu, og at tær – sum í hesum føri – ikki órógva óneyðuga nógv.

– Um ein rás ikki hevur sendiviðurskiftini í lagi, kunnu vit steðga sendingunum hjá teimum, men tann møguleikan hava vit ikki gjørt nýtslu av enn, sigur Don Petersen.

Hann heldur, at tvær orsøkir eru til trupulleikarnar hjá klaksvíkingum í hesum døgum. Onnur er, at gomlu lurtitólini ikki hava nóg góðar móttakarar, sum kunnu skilja fleiri rásir frá hvørjari aðrari.

Hin orsøkin er, at Lindin møguliga sendir ov hart av Brúnaskarði, og at hetta skapar stórar trupulleikar í lurtaralandinum.

– Vit rokna við, at Føroya Tele fær skil upp á sendaran hjá Lindini, so hann ikki órógvar hinar rásirnar, og tey, sum skulu lurta eftir útvarpi, sigur Don Petersen.

### Senda ov hart

Í fjør vóru óalmennar mátingar gjørdar av sendistyrkini hjá føroysku rásunum, og hesar vístu, at bæði Lindin og Rás 2 sendu við alt ov stórari styrki.

Um styrkin ikki er, sum hon skal verða, órógvar tað lurtitólini og hinar rásirnar, og tað er helst hetta, sum ger seg galdandi í Klaksvík í hesum døgum.

Tað eydnaðist okkum ikki at fáa viðmerkingar frá nevndarformanninum í Lindini ella leiðaranum á Radiodeildini hjá Føroya Tele áðrenn evstamark í gjár. Báðir sótu á fundi fyrrapartin.



*Lindin hevur fingið nýggjan sendara á Brúnaskarði í Klaksvík, men hesin órógvar lurtitólini í Klaksvík. Fjarskiftiseftirilitið er komið upp í málið*




Íroknað er ferðing aftur og fram við Atlantic Airways og gisting í fýra nætur við morgunmati á Rosemount Skenehouse. Prísurin er treytaður av, at trý pør ferðast saman og búgva í somu 4-mans íbúð. Sama tilboð við einkultkamari kostar 1998,- fyri hvønn. Tilboðið er galdandi vikuskiftini 22. - 26. februar, 1. - 5. mars og 8. - 12. mars. Ferðaavgjaldið sum er 474,- er ikki íroknað.

SANSIR · TEL 355 355

Atlantic Airways
Tel 333 900 · www.atlantic.fo

Fæst á øllum ferðaskrivstovum kring landið